# Hús á Toftum til sølu

Um hóskandi boð fæst verður ognin Regnavegur 45, matr. nr. 368c, Tofta bygd seld. Talan er um eini minni hús á umleið 35 fermetrar í einari hædd við krúpikjallara og tilbygningi uppá 10 fermetrar.

Innrætting: Køkur/stova saman, gangur, baðirúm og kamar. Miðstøðuhiti er í húsinum. Húsini eru bygd sum eini sethús, men mest nýtt sum summarhús. Alt innan í húsinum fylgir við keypinum. Húsini eru í góðum standi, urtagarður er eisini. Grundøkið er 453 fermetrar.

**Nærri upplýsingar fáast á telefon 374 512 og fartelefon 22 18 92.**
**Teldupost: nordberg@post.olivant.fo**

www.tutl.com



Vit hava opið til kl 23.00 mentanarnáttina

tutl

á Káta Horninum




Vit hava lekkur undirklæðir, beltir, hárprýði og hópin av øðrum prýðislutum frá Glitter

FIX't – til kvinnuna

v/Elin og Oddvør · Bøgøta 15 · Tórshavn · Tlf. 318545 & 212518



# Motorsúkkla

Suzuki SV1000, maj 2007, 1400 km, sera væl hildin, til sølu fyri kr. 90.000.

**Ring ella send SMS til 541235**

# Sølufólk/Lærlingur
## til Málingahandilin í Havn

Søkt verður her eftir sølufólki/lærlingi til Málingahandilin við landavegin í Havn.

Hevur tú hug at selja máling, tapet, persiennur o.a?

So er tað møguliga tær vit leita eftir.

Málingahandilin søkir eftir lærlingi ella sølufólki at byrja skjótast tilberð.

Vit hava selt máling síðan 1962, og ætla at selja máling í nógv ár enn.

Fyrimunur er um tú hevur royndir við máling og koyrikort til persónbil.

Krav til at blíva lærlingur er at tú hevur FHS útbúgving.

Eru spurningar, so eru tygum altíð vælkomin at ringja 313825 og spyrja eftir Helga á Reynatrøð.

Málingahandilin við landavegin. Tlf 313825

VØRUHÚSIÐ

**Litaval P/F · Box 1019 · 100 Tórshavn**

# SJÓBJARGINGARSTØÐIN MRCC- Tórshavn

**mrcc@mrcc.fo · www.mrcc.fo**
**Tlf: 35 13 02 · Fax: 35 13 01**
**Inmarsat C: 492 888 021**

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar innan fyri hesar knattstøður:

61°00,0 N 004°25,0 W
61°35,0 N 004°25,0 W
61°35,0 N 003°20,0 W
61°00,0 N 003°20,0 W

Felagið Chevron kannar økið.

Byrja verður: ......................06.06.2008
Arbeiðið tekur væntandi: ....7 dagar
Skipanavn: .........................Malene Østervold
Kallibókstavar: ...................LCIU3
Heimstaður: .......................Bergen
Fiskiveiðiumboð: ................Absalon V. Eliasen

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um arbeiðið fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá sjóbjargingarstøðini, www.mrcc.fo, ella á telefon 351302.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

TVØROYRAR KOMMUNA

# Størv til Dagstovnin Mýrifípan í Trongisvági

Vit søkja eftir **3 pedagogum** og einum **fysio-** ella **ergoterapeuti** til stuðulstoymið.

Tveir pedagogar fara í farloyvi ávíkavíst ½ og 1 ár.

Tímatalið kann verða frá 20 til 40 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 04.08. 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðsøkið hjá Stuðulstoyminum er:**
- At stuðla og stimbra børnum við serligum tørvi; primert teimum við tilknýti til Mýrifípuna/Sóljuna
- Vegleiða og ráðgeva um børn við serligum tørvi
- Arbeiða fyribyrgjandi
- Geva fakliga vegleiðing til starvsfólk og foreldur

Vit kunna bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur. Tú hevur eisini møguleika at koma á viðkomandi skeið.

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir; skalt samstarva við foreldur, starvsfólk og aðrar fakbólkar
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfólkum
- At tú ert lagalig/ur, vísir gleði og áhuga í starvinum
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum

**Stovnslýsing:**
Mýrifípan er ein dagstovnur hjá Tvøroyrar Kommunu. Her ganga 75 sera fitt børn í aldrinum 0 til 7 ár , og 20 dugnalig starvsfólk. Stovnurin er skipaður í 4 eindir, 1 vøggustova, 2 barnagarðsstovur og ein útibarnagarðsstova/ Sóljan til tey elstu børnini.

Í stuðulstoyminum arbeiða í løtuni 2 pedagogar 30 og 35 tímar.

Vit samstarva við Sosialu Deild í Tvøroyrar Kommunu og samstarvskommunurnar, og við aðrar fakbólkar, so sum serráðgeva, heilsufrøðing og talulærara.

Stuðulstoymið er ein eind fyri seg, ið fyrst og fremst tekur sær av børnum við serligum tørvi, harnæst er ráðgevandi og vegleiðandi fyri foreldur og starvsfólk.

**Lønarviðurskiftir:**
Løn sambært sáttmálað millum Føroya Pedagogfelag og Kommunufelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Guðruna Petersen, leiðara tlf.372700

**Umsókn:**
Umsókn, saman við prógvið og viðmælum skulu verða Dagstovninum Mýrifípuni, Smærugøta 8, FO – 826 Trongisvágur, innan 20.juni 2008

**Tvøroyrar kommunu**
800 Tvøroyri

Lesið Sosialin -tað loysir seg

**Roknskapartænastur kring Føroyar**

- Bókhald
- MVG-uppgerð
- Grannskoðan
- Roknskapur

...altíð dagførdir!

Roknskaparstovan, bkv.fo
Telefon 310090
Email: bkv@bkv.fo
J. Dahlsgøta 2 · FO-100 Tórshavn